# Álendingar á vitjan

**Í hesum døgum er mentanarnevndin hjá álendska tinginum á vitjan í Føroyum. Virkandi forkvinnan, Katrin Sjøgren, heldur álendingar og føroyingar hava nógv til felags á mentanarliga økinum**

VITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Landsstýrið, løgtingið og teir ymisku løgtingsmenninir hava havt óvanliga nógvar vitjanir í summar. Fyrr í vikuni vitjaði danski umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard, Jógvan við Keldu, landsstýrismann, og í løtuni er álendska mentanarnevndin á vitjan.



*Fríggjadagin vitjaði álendsksa mentanarnevndin í mentamálaráðnum, har tey millum annað heilsaðu upp á Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Ferðavinnan er eitt gullnám

Katrin Sjøgren er virkandi forkvinna í álendsku mentanarnevndini, tí vanligi formaðurin hevur verið fyri einum ferðsluóhappi, og hann er tí ikki við í Føroyum.

– Mentanarnevndin hjá løgtinginum var á vitjan í Álandi fyri einum ári síðani, og tá funnu vit út av, at vit hava sera nógv til felags. Tí hildu vit í álendsku nevndini, at tað hevði verið áhugavert at vitja í Føroyum, og nú eru vit her, sigur Katrin Sjøgren.

Forkvinnan heldur, at bæði Føroyar og Áland hava ein felags trupulleika, nevnliga at vit í alt ov stóran mun bert hava eitt bein at standa á. Í Føroyum er tað fiskivinnan, ið er altavgerandi fyri samfelagið, meðan tað í Álandi er sjóvinnan, ið hevur ovurhonds samfelagsligan týdning. Eg haldi tí, at báðir partar hava nakrar royndir, ið kunnu verða til gagns fyri hini, sigur Katrin Sjøgren.

– Eg haldi, at eins og í Álandi er ferðavinnan eitt alternativ til høvuðsvinnuna. Vit eru kanska komin eitt sindur longur enn tit við at menna ferðavinnuna, men tað er einki at ivast í, at her eru stórir møguleikar í Føroyum. Vit vistu, at tit høvdu eina stórbæra náttúru í Føroyum, men at hon skuldi verða so stórfingin, høvdu vit ikki væntað. Talan er í veruleikanum um eitt gullnám, sum tit eiga í tykkara náttúru, heldur Katrin Sjøgren.

Álendska mentanarnevndin kom til Føroya hósmorgunin, og hon fer av landinum aftur sunnudagin. Á ferðini verður vitjað í løgtinginum, í Norðurlandahúsinum, ymiskum ítróttarfeløgum, og so fer nevndin eisini til ymisk mentanarlig tiltøk, meðan hon er í Føroyum.

# Skifta kloakkirnar




*Trappurnar í gomlu posthúsbrekkuni eru burtur, tí at kloakkirnar verða skiftar út. Tá ið arbeiðið verður liðugt, kemur alt tó at líkjast sær sjálvum aftur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nógv havnarfólk hava seinastu dagarnar undrast á, at trappurnar í Posthúsbrekkuni úr Tórsgøtu niðan á Vaglið eru burtur**

ARBEIÐI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er tó einki at stúra fyri hjá teimum, sum óttast fyri, at trappurnar eru horvnar og ikki koma aftur, tí tær koma aftur.

### Vanlig kloakkútskifting

Mikael Viderø, býararkitektur, sigur, at tað, sum verður gjørt í Posthúsbrekkuni í løtuni, bert er ein vanlig útskifting av kloakkunum á staðnum.

Arbeiðið er ikki tengt at umvælingunum í kjallaranum á gamla posthúsinum, har sum ein partur av býráðsumsitingini nú heldur til.

Sum vit hava umrøtt í blaðnum her áður, so verður gamli posthúskjallarin gjørdur um til matarhøli hjá starvsfólkunum hjá býráðnum, og ætlanin er eisini, at talan skal verða um eitt matarstað, ið eisini hevur opið um kvøldarnar.

Nær arbeiðið verður liðugt, dugir Mikael Viderø ikki at siga í løtuni.

# Eingin løgregla í Vestmanna

Seinnapartin mikudagin kundu vestmenningar staðfesta, at eingin politistøð longur er í bygdini. Mikudagin bleiv politiskeltið við politistøðina nevnliga tikið niður, og frá hósdegnum av noyddust vestmenningar at venda sær til løgregluna í Havn, um teir hava tørv á hjálp.

Tað hevur í seinastuni verið frammi, at rættuliga nógv smærri og størri lógarbrot hava verið í bygdini, men løgreglan í Havn metur ikki, at talan er um nakran stórvegis trupulleika.

**tn**




*Mikudagin bleiv politiskeltið við politistøðina í Vestmanna tikið niður, og harvið noyddust vestmenningar at staðfesta, at teir nú noyðast at venda sær til løgregluna í Havn, um teir hava tørv á hjálp.*

*Mynd: Jákup Durhuus*

# Arbeiða í Leynatunnlinum

Tey, sum dagliga ferðast gjøgnum Leynatunnilin, noyðast næstu dagarnar at brynja seg við toli, tí tá verður arbeitt í tunnlinum. Arbeiðið í Leynatunnlinum hevur við sær, at næstu tvær vikurnar verður ferðslan leidd gjøgnum tunnilin við ljósregulering millum klokkan átta á morgni og sjey á kvøldi. Um næturnar og í vikuskiftinum er tunnilin tó opin sum vant, skrivar Landsverk á heimasíðu sínari.

**tn**

Lesið Sosialin -so eru tit við!